# Kunngerð um útgjaldsdagar í 2006

Við heimild í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 við seinni broytingum um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, § 16, stk. 4, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina fyrisett:

**§ 1.** Fyri 2006 verður arbeiðsloysisstuðul útgoldin fyri í alt 252 dagar. Stk. 2. Umframt leygar- og sunnudagar verður ikki útgoldið fyri hesar halgidagar:

- Skírhósdag (13. apríl)
- Langafríggjadag (14. apríl)
- 2. páskadag (17. apríl)
- Dýra biðidag (12. mai)
- Kristi himmalsferðardag (25. mai)
- 2. hvítusunnudag (5. juni)
- 1. jóladag (25. desember)
- 2. jóladag (26. desember)

**§ 2.** Henda kunngerð fær gildi frá 1. januar 2006 og er galdandi fyri alt árið 2006.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina, 8. desember 2005.
Alfred Petersen (sign.) formaður.
/ Ernst Jacobsen (sign.)

SANSIR TEL 355355

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 19 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður val t av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo

## Avloysarastarv sum arkitektur, verkfrøðingur ella byggifrøðingur

### á Teknisku Umsiting hjá Klaksvíkar Kommunu

**Ein av byggifrøðingunum á Teknisku Umsiting hjá Klaksvíkar Kommunu fer í farloyvi frá 1. januar til 31. desember 2006. Tí er eitt tíðaravmarkað starv, nevnda tíðarskeið, hervið leyst at søkja.**

**Høvuðsuppgávurnar verða:**
Byggimálsviðgerð, býarplansarbeiði, eftirlit, planlegging, projektering av kommunalum arbeiðum og aðrar málsviðgerðir eins og dagligar uppgávur hjá umsitingini.

**Persónligir førleikar og eginleikar:**
Vit sóknast eftir útbúnum arkitekti, byggifrøðingi, verkfrøðingi ella persóni við aðrari viðkomandi útbúgving.
Dentur verður lagdur á, at umsøkjararnir duga væl at leggja arbeiðið til rættis, eru fyrikomandi og hava munnligan og skrivligan málførleika. Royndir á nevndu økjum kunnu geva fyrimun

**Starvið verður sett skjótast tilber, og lønin verður sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.**

**Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til býarverkfrøðingin ella býráðsskrivaran á tlf. 410000.**

Umsóknir, saman við prógvið, møguligum viðmælum v.m., verða at senda til:

**Klaksvíkar býráð**
Postsmoga 2
700 Klaksvík

**og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. januar 2006.**

## Læknaskrivari

Hjá kommunulækna Jaspur Petersen er eitt avloysarastarv sum læknaskrivari 3/4 tíð leyst at søkja fyri læknaskrivara í farloyvi til setan 1. mars 2006 og ætlandi fram til 30. november 2006, møguliga longri.

**Førleiki**
- útbúgving sum læknaskrivari ella annar hóskandi førleiki
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til læknastovuna tlf. 310110.

Umsóknarfreistin er úti 22. januar 2006.

Skrivlig umsókn við CV, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Kommunulækna Jaspur Petersen,**
**Berjabrekka 1**
**FO-100 Tórshavn**

## Søkt verður eftir

Mekanikara/maskinsmiði til verkstað okkara.

Arbeiði fevnir um, at hava dagligu leiðsluna av verkstaðnum, harumframt kundarøkt, umvælingar, servisu v.m.

Umsøkjarar mugu verða mekanikarar ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR

FO 430 Hvalvík
Tlf. 422394

## Grundøki í Klaksvík til sølu

**Grundøki við Kjalarvegin (matr.nr. 718)**
**432 m² til víddar,**
**verður selt um hóskandi boð fæst.**

**Tel 45 60 36 ella +45 28 60 56 26**

## Frítíðarbátur til sølu



**29 fót Tresfjord Ultra**
**við 200 hk volvo penta motori.**

**Er sera væl hildin og væl útgjørdur. Hevur allar hentleikar s.s. ljósmotor, oljufýring, bjargingarbát, radara, GPS plottara, dýbdarmátara, bógskrúvu, sjónvarp, køliskáp, wc og m.a.**

**Áhugaði kunnu ringja á**
**tlf. 332384 – 212384**